

í Vágum, vildu hava málið um útbygging út Vágum útsetta inntil kanningin var klár. Teir kundu eftir øllum at døma bert ráðført seg við landsstýrismannin á økinum.

**Samtyktu forkromaðu loysnina**

Tá Løgtingið fyri einum mánaði síðani, um morgunin tann 16. mars, samtykti at byggjast skuldi út í Vágum, var tað nevniliga við eingin av hesum, ið atkvøddi ímóti uppskotinum um at byggja út á 1799 metrar í Vágum.

Bæði John Johannesen og Poul Michelsen atkvøddu fyri uppskotinum, meðan Sjúrður Skaale og Bjarni Djurholm ikki vóru til staðar, meðan atkvøtt varð.

Tað, sum síðani er komið fram, eftir at útbyggingin í Vágum er samtykt er, at tingmenn eru vorðnir samdir um, at útbyggingin í Vágum, hóast tað ikki er tann optimala loysnin, er ein betring av verandi flogvallarviðurskiftum í Føroyum, og tí varð einmælt samtykt.

**Serfrøðin peikar bara á Glyvursnes**

Eitt stendur tó greitt. Kanningin, sum Landsverk legði fram í gjár, er bert ein staðfesting av tí, sum vit higartil hava fingið ábendingar um. Nevniliga at besta staðið at leggja ein framtíðar flogvøll í Føroyum, er á Glyvursnesi.

Hetta er sama niðurstøða, sum tyrluskiparin Andrias Mouritsen hevði, tá hann í desember tosaði við Rás2. Hesa niðurstøðu bygdi hann á sína útbúgving sum tyrluskipari og sínar royndir við tyrluflúgving í Føroyum. Og veit nakar um turbulens í Føroyum, so er tað júst tyrluskiparar.

Hetta er tað sama, sum veðurfrøðingur, sum Landsverk hevur ráðført seg við, vísir á – nevniliga at tað er einki sum bendir á at turbulensur er ein trupulleiki á Glyvursnesi, meðan tað er greitt, at turbulensur er ein trupulleiki í Søltuvík og í Vágum.

**Meðan vit bíða**

Men niðurstøðan hjá Landsverki er – sum Johan Dahl eisini vísti á fyri Rás2 í gjár – enn bert ein fyribils niðurstøða, sum er grundað á landafrøðiligar og veðurfrøðiligar kanningar.

Ætlanin er nú at gera víðari kanningar , fyri at fáa eina fullfíggjaða mynd av turbulensviðurskiftunum, fyri bæði Søltuvík, sum framvegis verður kannað, Glyvursnes og møguliga eisini Vága Floghavn.

Harumframt er ætlanin í ár at arbeiða víðari við at gera kostnaðarmetingar og eitt prosjektuppskot til ein nýggjan flogvøll á Glyvursnesi.

Eftir at hetta er gjørt, skal ein búskaparlig kanning gerast, sum skal vísa, um tað nú loysir seg fyri samfelagið at byggja eina flogvøll á Glyvursnesi. Og meðan vit bíða eftir henni, er arbeiðið at byggja út í Vágum farið í gongd, og verður væntandi liðugt um somu tíð ella stutt eftir at búskaparliga kanningin fyriliggur um eini tvey ár.

Henda búskaparliga kanning skal tá eisini taka hædd fyri, at vit hava fingið ein útbygdan flogvøll í Vágum. Tí er enn minni sannlíkt, at tað tá fer at loysa seg fyri samfelagið at byggja ein flogvøll á Glyvursnesi.

Tí er nógv sum bendir á, at teir politikarar, sum hava víst á, at ein útbygging í Vágum fór at skjóta byggingina av einum alternativum flogvølli í Føroyum upp til 45 ár fram í tíðina, nú fáa rætt.

*rogvi@sosialurin.fo*

# Ein ræðuliga syrgiligur dagur

Poul Michelsen, løgtingsmaður, heldur, at tað var ein ræðuliga syrgiligur dagur fyri Føroya land í gjár, tá ið tað varð avdúkað, at Glyvursnes er best egnað til flogvøll

Tað er ræðuliga syrgiligt fyri Føroyska samfelagnum, at tað nú verður staðfest, at tað er best at byggja nýggjan flogvøll á Glyvursnesi, akkurát, sum Løgtingið hevur samtykt at brúka 365 milliónir til at longja ein óbrúkiligan vøll í Vágum, sum hann málber seg.

Hann staðfestir, at vit hava spælt fallitt, tá ið tað kundi lata seg gera at gjøgnumtrumfað eina útbygging í Vágum.

- Øll, sum varða av flúgving upp á Føroyar, eisini fakligu myndugleikarnir, hava spælt fallitt og hava latið seg stýrt av øðrum áhugamálum enn teimum fakligu, tí vit hava ikki tikið eina avgerð útfrá einum tørvi við hava á framtíðar flogferðslu.

- Bara flogskiparar hava sagt sína hugsan, men so óttrúligt tað ljóðar, lurtaði ongin eftir. Vit hava øll tapt, sigur Poul Michelsen.

- Nú standa vit so í teirri støðu, at vit brúka 365 milliónir upp á ein óbrúkiligan vøll og tað er næstan helvtin av tí tað kostar at gera ein 1799 langan vøll á Glyvursnesi.

-Tí kundu vit gagnnýtt hasar 365 milliónirnar nógvar ferðir betri við at lagt tær niður í Glyvursnesi.

Men hví atkvøddi tú so fyri?

- Undirtøkan fyri útbyggingini í Vágum var so stór, at har var ongin undirtøka fyri nøkrum øðrum. Tað er tí, at tað, sum verður gjørt í Vágum er hóast alt betri enn onki og tað vildi eg ikki leggja meg í vegin fyri, sigur løgtingsmaðurin.

Men hann staðfestir, at flogvøllurin í Vágum verður størsta forðingin fyri at føroyska samfelagið kann mennast og byggjast út og tí má vøllurin á Glyvursnesi koma ongantíð ov skjótt.

*aki*



# Bjarni Djurholm angrar

## Hevði eg vitað hetta, hevði eg ikki atkvøtt fyri at longt flogvøllin í Vágum, sigur Bjarni Djurholm

- Vit skundaðu okkum ov nógv.

Tað er niðurstøðan hjá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, nú Landsverk hevur víst á, at besta staðið at byggja flogvøll á, er á Glyvursnesi.

Hann var landsstýrismaður í vinnumálum, tá ið kanningarnar vórðu settar í gongd og nú fyriliggur so úrslitið, nakrar fáar vikur eftir at Løgtingið samtykti at longja vøllin í Vágum.

- Eg havi altíð hildið, at vit áttu at bíða við atkvøðugreiðsluni um at longja vøllin í Vágum, til hendan kanningin var liðug. Men eg skal taka í egnan barm og viðurkenna, at eg stóð ikki við tað sjónarmiðið, tí í álitinum frá vinnunevndini tók eg undir við útbyggingini.

Hinvegin var Bjarni Djurholm ikki til staðar í Løgtinginum, tá ið atkvøðugreiðslan var.

Men hann ásannar, at hann situr eftir við eini løgnari kenslu av at útbygg-ingin í Vágum varð skundað ígjøgnum.

- Nú kunnu vit bera ótta fyri, at øll framtíðar útbyggingin verður skotið ein mansaldur út í framtíðina.

Kortini heldur hann, at nú má Løgtingið raðfesta flogvøllin á Glyvursnesi og fara undir tær fyrireikingarnar beinanvegin og so heldur lata vera við at útbyggja farstøðina í Vágum meiri enn allarhægst neyðugt.

Men hví legði tú navn til álitið í vinnunevndini, tá ið tú visti, at kanningin kom nú?

- Eg væntaði ikki, at úrslitið av kanningini var so eintýðugt, sum tað er. Vit vóru komin langt við fyrireikingini í Vágum og helt ikki, tað var rætt at leypa frá í síðstu løtu. Og veruleikin er eisini, at vit fáa eina stóra útbygging fyri lítlar pengar.

Hevði tú gjørt tað ørvísi, vissi málið gekk umaftur?

- Ja!

*-aki*